Tíðindablaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Jóstinus Eliesgaard
Eyðun Klakkstein

Útgevari, uppsuling og prent: P/I Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 28
Argjum

Postadr.: Postsmoga 78
110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Marknaósemjan við Bretland

Oddagrein

UM góðan mánað verður eitt nýtt umfar í samráðingunum um rmarkið millum Føroyar og Bretland. Fundurin er í London og man nærkast tí 20. fundinum í hesi drúgvu orrustu. Vit eru nú so von at hoyra um hesar úrslitaleysu fundir, at fáur føroyingur man trúgva, at nakað fer at spyrjast burtur úr í London fyri jól. Okkara samráðingarfólk fara neyvan at fáa annað burtur úr enn at kunna avgreiða sitt jólakeyp í bretska høvuðsstaðnum.

MEN spyrja vit so lim í bretsku samráðingarnevndini, tykist tónin vera ein annar. Um hetta bara eru lótir og vanligt "millumsamráðingarkynstur" vita vit ikki. Men maðurin, sum í dag úttalar seg til Sosialin, hevur í mong ár havt nógv samband við Føroyar. Hann eitur Anthony Layden og hevur starvast á bretsku sendistovuni í Danmark í fleiri ár. Hann hevur verið ein av oddamonnunum har, men er farin at arbeiða í uttanríkistænastuni í London.

VIT ivast ikki í, at maðurin er ein hampamaður og gott fólk. Men eitt er diplomati - annað er politiskur veruleiki. Spurningurin vit her vilja seta Anthony Layden er: tá tit halda, at so nógv talar fyri, at tit kunnu vinna sakina við dómstólin í Haag, hví tá brúka so nógv ár til at finna eina samráðingarloysn! Her er okkurt, sum ikki ruggar rætt í argumentatiónini. Tit hava neyvan samráðst við føroyingar øll hesi árini fyri harvið at fáa eitt verri úrslit, enn um tit fóru til Haag, væl! Uttan at siga nakað ringt um bretar, so halda vit, at bretska uttanríkisráðið í London við sínum upprunaliga óverdugu kræevi hevði vónað at fingið føroyingar og danir at "hoppe på limpinden". Tað hava føroyingar og danir ikki gjørt, men hava harafturímóti hildið upp á okkara grundleggjandi rætt: at kunna brúka miðlinju sum undirgrundarmark eins væl og fiskimark. Ávísar justeringar í hesum sambandi hava føroyingar tó viljað tosað um, harí skulu orðini hjá Layden, um at báðir partar hava slakað, helst eisini skiljast.

TAÐ kunnu standa ómetaliga stór virði upp á spæl í hesum máli. Tí hava føroyingar gjørt rætt í ikki at boyggja seg fyri bretska trýstinum. Men sjálvandi mást tú í einihvørji samráðing hála og lora og royna at fáa sum frægast burtur úr. Tað gera bretar, og tað eiga vit at halda fram við at gera. Tá bretar nú siga, at málið hevur ikki skund hjá teimum, so loyva vit okkum at ivast. Stóra innrásin av oljufeløgum í sambandi við boring í Lopra í dag boðar frá, hvussu stórur áhugi er fyri øllum økinum. Spurningurin er so, hvør fær mest burtur úr í síðsta enda við at forhála málið - vit ella bretar! Kann partur av taktikki breta vera at fáa okkum at fara til Haag! Her ræður um at vera umhugsin og ikki leypa framav. Vit stuðla okkara samráðingarfólkum og halda, at tey hava borið seg rætt at ikki at lúta fyri trýsti.

Sosialurin

Lesarabrøv

Ábreiðslan er úr vón og viti

Í Dimmalætting 24. oktober skrivar formaðurin í Arbeiðsmannafelagnum á Sandi, at Jógvan Adolf Johannesen leikar í, tí at ætlanin at lata flakavirkið í Skopun upp aftur, verður av ongum. Samstundis leggur hann Jógvan Adolf Johannesen undir, at hann bert arbeiðir fyri Skopun.

Henda ábreiðsla - fyri at siga tað hampuligt - er burtur úr vón og viti, av tí at Jógvan Adolf Johannesen arbeiðir fyri alla oynna.

Annað er, at sonevnda sandoyarætlanin - av Høgna Edvinsson verður skýrd skopunarnevndin - var ein bundin uppgáva, nevniliga hvussu flakavirkið í Skopun kundi lata upp aftur.

At Jógvan Adolf Johannesen hevur arbeitt ímóti at virkið á Sandi skuldi lata upp aftur, passar ikki. Hann hevði í sínari tíð eina heildarætlan, har bæði virkini í oynni skuldi arbeiða saman soleiðis, at frystur fiskur - eini 5000 tons - skuldi leggjast upp á Sandi, upptinast og skiljast. Tað, sum skuldi vera til saltfisk, skuldi arbeiðast á Sandi, meðan flakaarbeiðið skuldi gerast í Skopun. Ætlanin var sostatt at skaffa arbeiði til bæði virkini.

Henda ætlan varð sprongd, óneyðugt er at siga av hvørjum. Úrslitið kenna vit. Áhaldandi klandur, sum m.a. Føroya Fiskavirking hevur kunnað gjørt sær dælt av.

Tí eini góð ráð til Høgna Edvinsson og aðrar, sum hugsa sum hann. Latið okkum heldur arbeiða í felag, til gagns fyri oynna, tí samfelagið Sandoyggin er ikki størri enn so, at vit øll kunnu arbeiða saman, og tann vegin standa sterkari fyri einum felags úrsliti.

Jógvan Adolf Johannesen, tingmaður

Virðing fyri skapanini!

Náttúran eigur eisini rættindi, hon er ikki ókeypis! Tað er harmiligt at spurningurin um umhvørvisvernd, ikki hevur betur pláss í politiska orðaskiftinum

Øll droyma vit um eina betri og tryggari framtíð!

Men – tað er ikki nóg mikið við dreymum!

Tað er í dag vit viðgera tryggleika og framtíðarviðurskifti okkara!

Uttan reina luft, reint vatn og óspilta náttúru eru vinnulivsmøguleikar okkara í sori á øllum økjum!

Í okkara grannalondum er havdálkingin øgilig, og áir og vøtn liggja í andaleypi, og eisini siggja vit, hvussu gamlar kemiskar goymslur týna náttúruna, umframt at luftdálkingin eisini er ein ógvusligur trupulleiki. Uti í heimi er stórt uppruddingararbeiði neyðugt.

Vit skulu ikki bert reinsa, vit skulu eisini endurreisa spilt náttúruvirðir. Vandi er fyri, at djóra- og plantusløg hvørva. Samtíð okkara hevur eisini ábyrgd – vit mugu reinsa umhvørvi, so at djór og plantur aftur trivast. Vit hava skyldu at siggja til: at vit kunnu liva, arbeiða og brúka í samlag við náttúruna, sum eisini kemur okkum føroyingum til góðar.

Vit føroyingar hava í størri mun skyldu at geva umhvørvisdálking størri ans í orðaskiftinum, og hava eisini skyldu til at fara uppi altjóða samstarv, so at millumtjóða avtalur kunnu gerast um vernd av náttúruni.

Vit eiga eisini at umhugsa um ikki føroysk menningarhjálp í størri mun eigur at fara til umhvørvis- og náttúruendamál, so at tryggjast kann at hjálpin eisini á tí økinum virkar sum ætlað.

Vakurt og væl er skrivað og tosað um hesi mál í nøkur ár. Viljin hevur ikki skorta, og ráðstevnur um dálking hava verið hildnar, og altjóða avtalur eru samtyktar.

Hevur tað hjálpt?

Eru útlit til at mannaættin vaknar, meðan tíð er, og letur skynsemið ráða til tess at bjarga tí náttúru og umhvørvi, ið er treytin fyri lívi, tryggleika og vælferð?

Treytin er, at trupulleikin verður viðurkendur fult og heilt. Náttúran fer ikki at loyva okkum at fara við sær, sum okkum lystir. Náttúran krevur varsemi og fyrilit av menniskjunum.

Náttúran eigur eisini rættindi. Hon er ikki ókeypis!

Umhvørvisspurningar tørva góð umboðsfólk, tað er rætt og slætt eingin ívi: tað má eisini verða góður politikkur at tryggja – **umhvørvið- nú og í framtíðini! Vit eiga at hava størri virðing fyri skapanini!**

Lasse Klein

KOYRIKORT
Privat
sum vinnuligt
– so er tað ...
KOYRISKÚLIN
Á ARGJUM
Ring og bið um tíð
12270 / 86680

BINGOTØLINI
í dag
26 84